# Martin Karl í HM í bogaskjóting

**Eftir sorgarleikin fyri trimum árum síðani, tá suðuroyingurin Martin Karl Olsen misti annað beinið, luttekur hann nú í heimsmeistarakappingini í bogaskjóting fyri brekað í Spania**

COMEBACK
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Eg eri sera takksamur fyri tey, sum hava stuðlað mær og skumpað undir meg at fara í gongd við eina ítróttargrein, eftir at eg misti beinið, sigur Martin Karl Olsen m.a.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

32 ára gamli suðuroyingurin, Martin Karl Olsen, er fyrsti føroyski bogaskjúttin, sum ÍSB hevur sent til eina altjóða kapping.

Fyri trimum árum síðani fóru allar yvirskriftirnar við einum syrgiligum tilburði, tá ein maður misti annað beinið, men sami maður umboðar nú Føroyar í heimsmeistarakappingini í Spania.

## Takksamur

Martin Karl Olsen er gamal svimjari, og tá hann tók læraraprógvið, var ítróttur hansara linjufak.

– Tískil eri eg sera takksamur fyri, at eg aftur havi nakað at íðka, og somuleiðis skulu tey hava eina tøkk, sum hava stuðlað mær og skumpað undir meg at fara í gongd við eina ítróttargrein, eftir at eg misti beinið, greiddi Martin Karl frá mikukvøldið fyri, at hann fór avstað.

Takksemi hansara fer fyrst og fremst til venjara sín Mogens Egholm, sum er ein royndur maður innan bogaskjóting. Mogens Egholm gjørdist sjúkur undan heimsmeistarakappingini, og tískil er sviin Anders Jønsson við á ferðini sum venjari.

– Eisini eri eg takksamur fyri, at ÍSB setti seg í samband við meg eftir vanlukkuna, so eg aftur kom í gongd, sigur 32 ára gamli suðuroyingurin.

## Vant í 14 mánaðir

Martin Karl er ikki nakar royndur bogaskjótari, tí hann hevur bert vant í 14 mánaðir. Hann júst var ov stuttur til oyggjaleikirnar í summar við føroyska landsliðnum, men hann nærkast oddamonnunum í føroyskari bogaskjóting.

– Hevði seinasta kappingin, eg luttók í, verið úttøkukappingin til oyggjaleikirnar, hevði eg verið við, so framstig eru at síggja, sigur Martin Karl.

Hetta var ein stuðulskapping, og tá fekk hann 1238 stig av 1440 møguligum. Fremsti bogaskjútti okkara, Schandorff Vang, liggur beint omanfyri 1300 stig.

Heimsmeistarakappingin er frá 4.–14. september, og Martin Karl Olsen hevur vant næstan hvønn dag til hesa kappingina.

– Eg veit, at heimsmeistarin í bogaskjóting fyri brekað eisini er á »vanliga« svenska landsliðnum, so støðið er høgt, men væntandi liggja teir bestu beint omanfyri 1300 stig, sigur Martin Karl Olsen at enda.

---

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og regn eitt skifti. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og regn av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og ælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 13 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 16 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 18 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 24 |
| Róm | – |
| Malorca | 26 |
| Athen | 22 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 16 |
| New York | 19 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 26 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 967 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og grynnist.




Lágtrýstið við Ísland grynnist, men eitt minni lágtrýst við Føroyar fer norðureftir. Brúgvalagið haðani fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/08 kl. 06[00]– 04/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 13,5°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 03/09 kl. 06[00]–04/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 9,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

31. august: Mánin næstur jørðini
3. sept.: Fyrra kvarter
10. sept.: Fullmáni
16. sept.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 5. sep | 02.57 | 15.26 | 01.57 | 14.26 | 02.12 | 14.41 | 04.57 | 17.26 | 05.57 | 18.26 | 01.12 | 13.41 | 00.12 | 12.41 | 03.12 | 15.41 | 04.12 | 16.41 | 02.42 | 15.11 | 03.57 | 16.26 |
| 6. sep | 03.55 | 16.23 | 02.55 | 15.23 | 03.10 | 15.38 | 05.55 | 18.23 | 06.55 | 19.23 | 02.10 | 14.38 | 01.10 | 13.38 | 04.10 | 16.38 | 05.10 | 17.38 | 03.40 | 16.08 | 04.55 | 17.23 |
| 7. sep | 04.52 | 17.19 | 03.52 | 16.19 | 04.07 | 16.34 | 06.52 | 19.19 | 07.52 | 20.19 | 03.07 | 15.34 | 02.07 | 14.34 | 05.07 | 17.34 | 06.07 | 18.34 | 04.37 | 17.04 | 05.52 | 18.19 |
| 8. sep | 05.46 | 18.10 | 04.46 | 17.10 | 05.01 | 17.25 | 07.46 | 20.10 | 08.46 | 21.10 | 04.01 | 16.25 | 03.01 | 15.25 | 06.01 | 18.25 | 07.01 | 19.25 | 05.31 | 17.55 | 06.46 | 19.10 |

5 707265 100050 >